*Sverre Dan Joensen, oljuserfrøðingur úr Bahrain:*

# Western var rætta valið

*-Tað besta er, at eitt og sama felag gera allar kanningarnar og her er Western so avgjørt tað rætta valið. Føroyingar hava valt rætt og hevur tað ómetaliga stóran týdning, at kanningarnar eisini fevna um Lopraholið sigur Sverre Dan Joensen úr Bahrain.*


Ford

– so nógv besta bilkeypið –

EISINI Í FØROYUM

Við nýggja

FIESTA – ESCORT & MONDEO

eru tú og húski títt tryggari á vegnum enn nakrantíð.

Trygdin tann besta, ið fæst fyri pengar – men talan er eisini um mestu vælveru undir koyring, snið ið frøir eygað og tøkni, sum ber av øllum.

Avgjørt besti og »mest bilur« fyri pengarnar.

Tænasta á hægsta stigi.

SERA LAGALIG FÍGGING við fastari, lágari rentu. (Frá 11%)

– og sjálvsagt lata vit tín brúkta bil ganga inn í keypið!

Vitjið okkum í Akranesgøtu 5 ella ringið 13873 og fræittið um fyrimunirnar allar við bili frá FORD

Ford er framtíð í Føroyum

P/f WENZEL
Akranesgøta 5 - Tlf. 13873


-Eg eri sera fegin um, at fyritøkan Western hevur fingið hesa uppgávuna, tí hetta er eitt sera vælumtókt felag, ið vanliga ger eitt sera gott arbeiði. Eg eri eisini fegin um, at sama felag hevur fingið bæði loyvini. Tað kann hava stóran praktiskan týdning fyri kanningarnar Hetta sigur Sverre Dan Joensen, hálvur føroyingur, sum arbeiðir í oljuvinnuni í Bahrain. Hann hevur verið ein hin virknasti í orðaskiftinum um oljuspurningin.

Men tað, sum Sverre Dan Joensen er mest fegin um í sambandi við seismisku útbjóðinginga er, at Lopra er við í verkætlanini. Hetta var eisini tað, sum hann sjálvur stríddist so nógv fyri og royndi at gera vart við bæði í greinum í bløðunum, í frágreiðing til landsstýrið og á oljuráðstevnuni, sum varð hildin í Havn.

Sverre Dan Joensen er nevniliga millum teirra, sum halda, at seismiskar kanningar júst í Lopraholinum kunnu hava ómetaliga stóran týdning fyri framtíðar oljuleiting. Her er serliga talan um at gera sokallaðar vertikalar seismiskar kanningar, sum saman við kanningum úti á opnum hava kunnu geva okkum eina góða ábendin um, hvussu løgini undir basaltinum síggja út og um har eru møguleikar at finna olju.

Sverre Dan Joensen er fegin um, at tað arbeiði, sum higartil er gjørt av oljuráðleggingarnevnd og landsstýrinum í øllum undirgrundarspurninginu m

## Nátúrligt at samarbeiða við norðmenn

Nú norðmenn hava sett fram ynski um samarbeiði spurdu vit Sverre Dan Joensen, hvat hann heldur um slíkt samstarv!

Hann sigur, at vit føroyingar eiga at hava allar dyr opnar, tá farast skal undir at bjóða út arbeiðið at bora eftir olju við



Føroyar.

-Men tað er heilt nátúrligt at vísa ikki minst norðmonnum ans, tí teir hava arbeitt nógv úti á djúpum vatni, og tá hugsað verður um, at føroyska umráðið er næsti granni til norsku oljuøkini, so er nátúrligt, at hesi bæði londini arbeiða saman.

Sverre Dan Joensen heldur annars ikki, at føroyingar skulu binda seg til nakað ávíst felag nú, men at føroyingar skulu velja, hvønn teir vilja samarbeiða við tann tíð hetta kemur so langt.

Av tí at føroyska økið er so stórt, so kann tað væl vera, at føroyingar halda tað vera skilagott at samvinna við bretar nærhendis bretska markinum og við norðmenn, har jarðfrøðin samsvarar mest við teirra.

-Tað mest umráðandi er tó, at føroyingar ikki binda seg til nakran ávísan frammanundan. Men so lítið land sum Føroyar hevur ikki ráð til at hava fíggindar, tí er tað so umráðandi ikki at útihýsa nøkrum men geva øllum møguleika at vera við til at menna eina føroyska oljuvinnu.

Sverre Dan Joensen vísir annars á, at menningin innan oljuleiting hevur verið so øgilig hesi seinastu 10 árini, at føroyingar helst fara at fáa nógv tilboð frá stóru oljufeløgunum. Hesi feløg himprast ikki í dag við at bora eftir olju í slíkum økjum, har tað fyri bert fáum árum síðani hevði óhugsandi at leita eftir olju.

## Marknatrætan

Vit spurdu Sverre Dan Joensen, hvat hann heldur um støðuna í marknasamráðingunum!

-Mær hevði dámt best, um marknatrætan varð loyst, áðrenn farið varð undir at gera kanningar, men nú tá glið er komið á samráðingarnar haldi eg tað er rætt at fara undir seismiskar kanningar.

Annars havi eg ta fatan, at hildu føroyingar 100% fast við miðlinjuna, tá høvdu bretar ikki gingið við til nakra loysn. Nú havi eg skilt, at føroyingar ikki tvíhalda um miðlinjuna og hetta hevur so gjørt, at bretar hava avmarkað síni krøv munandi.

Sverre Dan Joensen heldur annars, at føroyingar hava klárað uppgávuna í samráðingunum sera væl og vónar hannn, at eitt úrslit fer at spyrjast burtur úr skjótt. Hann heldur tað vera rætt at fara undir seismiskar kanningar, hóast marknatrætan ikki er loyst, tí so nógv er hent á hesum økinum, har bretar hava funnið nógva olju, at tað kann eisini taka ov langa tíð hjá føroyingum at fara í gongd, um bíðast skal eftir einum endaligum úrsliti í marknasamráðingunum.

## Landsstýrið heldur tað tað lovar

Sverre Dan Joensen heldur annars, at landsstýrið hevur borið seg rætt at í oljumálinum. Tað hevur hildið seg avtalurnar og hetta er ómetaliga týðandi í oljuvinnuni.

-Tá tú lovar nakað, so stendur tú við tað. Og tað er júst hetta, sum er hent í Føroyum. Myndugleikarnir søgdu, hvat teir ætlaðu, og tað hava teir hildið. Føroyar kunnu vit líta á. Hetta er alfa og omega í oljuvinnuni sigur Sverre Dan Joensen, sum er sera takksamur fyri, at hann kundi vera við til oljuráðstevnuna, sum varð hildin í Havn herfyri.

-Eg havi alla tíðina Føroyar og føroyingar í tonkunum, og er tað nakað, sum eg kann hjálpa við, tá eg eri altíð tilreiðar sigur ein fryntligur og hugagóður Sverre Dan Joensen úr Bahrain við Sosialin.

**jan**


VIÐ EGNUM BÁTI Í NORSKA SKERGARÐINUM



4 fólk við báti til Bergens og aftur

Í lágárstíð ÚR EINANS....... 5.725,-
Í háárstíð ÚR EINANS....... 7.545,-

Ring tlf. 15900 og hoyr meira.

SMYRIL LINE

- títt ferðasamband við útheimin

J. Broncksgøta 37

TLF. 15900